# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

## Asterix og víkingarnir



**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Flest hava sum børn lisið tekniróðina Asterix. Um djørvu og hugnaligu gallarnar í bygdini Provoix, har Asterix og Obelix búgva og Majestix er høvdingi. Nú hevur enn ein teknifilmur um Asterix frumframførslu í Havnar Bio og um allan heimin.

Sjálvur átti eg øll bløðini um Asterix sum barn, so enn hvílur ein ávís nostalgi kring hetta megnarverkið.

Søgurnar um Asterix og vinirnar, ið berjast móti rómarunum vóru skrivaðar av teimum báðum Albert Uderzo og René Goscinny. Fyrsta søgan kom fram í 1959, og enn er hetta ein so væl dámd tekniróð, at hesi album enn verða gjørd til film.

Uderzo segði sjálvur, at:

”René og eg søgdu við hvønn annan, at arbeiði sum teknari á tekniróðum gevir ikki nógv løn, men vit skuldu hava tað stuttligt. Vit høvdu ikki rokna við, at róðin varð so vældámd. Tá vit funnu uppá søgurnar, hugsaðu vit um, at tær skulu kunna lesast á tveir mátar, bæði av børnum og vaksnum”.

Tað er einki nýtt í, at tað verða gjørdir teknifilmar um Asterix, tí tað finnast longu sjey ymiskir, sigur Udzero.

### Sera franskt

Tað er eitt serligur franskur heimur í Asterix, ið ofta verður tikin fram av nationalismugranskarum, ið júst síggja ímyndina av fronskum tjóðarsamleika í hesum persónunum í ár 46 e. Kr.

Hetta, at tey í bygdini hava ein serligan gandadrikk, ið ger at tey vinna á øllum, og serliga altíð enda vit at sita og eta villsvín er sera franskt. Ímyndinum at fransmaðurin fyrr hevur megna, at barst móti sjálvum Rómararíkinum er sjálvandi nationalistisk, og nakað, ið aftur kann brúkast í dag yvir fyri ES.

Søgurnar um Asterix og Obelix eru eisini mytiskar, søguligar og universellar, at tann lítli skal vinna á tí stóra, o.s.fr. Hetta, at søgurnar eru so universellar, ger at tekniróðin er týdd til ikki minni enn 103 mál.

### Víkingarnir koma

Í Asterix og víkingarnir, er tað bróðursonur høvdingan Majestix, ið er komin frá Parisium (Paris), hesin ungi drongurin er sum tannáringar flestur sera uppreistrarsinnaður. Hann reypar illa, men er tó ein ræðuskítur og ein ónytta.

Asterix og Obelix skulu tí gera hendan Provoix til eitt veruligt mannfólk. Hetta er ikki heilt lætt, tí við eitt koma víkingarnir frá Norðurlondum á vitjan. Teir hava hoyrt frá teirra gandakalli, Runograf, at ”ótti kann geva veingir”, og teir vilja læra hendan óttan betri at kenna. Teir hava hoyrt um hendan bangna Provoix, so teir gera ikki matari, enn at teir ræna hann. Nú eru Asterix og Obelix noyddir at fara eftir honum og hjálpa honum, men Provoix hevur forelska seg í dóttir høvdingan, ið kallast Abba, um hetta navnið er eftir svenska poppbólkinum ABBA veit eg ikki, men tað sum serliga er skeg við Asterix eru anakronismunar, at teir skemta við hesum tíðarvillum.

Tað er ikki so nógv at siga um filmin, søgan fylgir neyvt tekniróðini. Asterix og víkingarnir er sera væl gjørdur av Stefan Fjeldmark, ið fyrr hevur hevur tekna tekniróðina Snedronningen í 1981. Hann hevur arbeitt á stóra verkinum hjá Peter Madsen Valhalla. Seinast hevur hann gjørt góða filmin Terkel i knibe (2004), ið vann nogvar virðislønir og m.a. ein Robert.

Hetta er ein góður teknifilmur fyri bæði børn og vaksin.

**5 stjørnur av 6.**

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




### Walk the Line
FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 02.06 | kl. 20.15 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 03.06 | kl. 20.15 | kl. 23.30 |
| Mánadag | 05.06 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |




### Asterix og Vikingerne

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 02.06 | kl. 16.15 | kl. 18.15 |
| Leygardag | 03.06 | kl. 16.15 | kl. 18.15 |
| Mánadag | 05.06 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |




### X-Men 3

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 02.06 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 03.06 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Mánadag | 05.06 | kl. 19.15 | kl. 22.45 |




### Ice Age 2

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 02.06 | kl. 17.00 |
| Leygardag | 03.06 | kl. 17.00 |
| Mánadag | 05.06 | kl. 16.30 |

### KOMANDI FILMAR




### She's the Man
FRUMSÝNING

Fríggjadag 09.06




### V for Vendetta
FRUMSÝNING

Fríggjadag 09.06

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**